# Gerið íløgur runt alt landið, so tað munar!

ELSEBETH GUNNLEYGSDÓTTUR HANSEN



býráðslimur í Klaksvík

Tað er ongin loyna, at Klaksvíkar kommuna ikki er fíggjarliga væl fyri løtuni, og útlitini eru ikki serliga bjørt beint nú. Kósavirkið er framvegis lukkað. Hetta er sera óheppið og hevur keðiligar ringvirkningar við sær.

Her má og skal okkurt gerast fyri, at vit koma fyri okkum aftur. Klaksvíkar kommuna hevur ikki fíggjarligu orkuna í løtuni, og tí mugu allar góðar kreftir nú lyfta í felag. Havi áður nevnt, at landið skal gera íløgur her norðuri, sum skapa arbeiðspláss, og vil eg framvegis minna okkara løgtingsumboð á hetta. Tað eru 22 mill kr. settar av til tunnil norð um fjall, og er hetta eitt stig rætta vegin, men hví verður t. d. ikki byrjað uppá Trygdarmiðstøðina beinanveg.

Teir seinastu mánaðirnir eru umleið 200 fólk blivin arbeiðsleys í kommuni. Vit hava arbeiðsloysisstuðulin, og er hetta ein góð hjálp, men ikki nóg mikið. Borgararnir hava eisini rætt til eitt meira virðiligt lív, har tey sleppa til arbeiðis.

Um ikki okkurt verður gjørt nú, sum fær gongd á aftur, so verður støðan ikki góð. Handlar og aðrar vinnur, sum eru tengdar at fiskivinnuni, merkja niðurgongdina sera væl.

Vit hava áður upplivað, at Kósavirkið lat aftur. Hetta merktist so væl í býnum, at henda uppliving situr fast hjá teimum, sum upplivdu hesa tíðina.

Nú er so Kósavirkið enn einaferð lukkað. Sjálvt um røddir hava verið frammi um, at tað ikki hevði so stóran týdning, um Kósavirkið lat aftur, so uppliva vit í dag í veruleikanum fullkomiliga tað øvugta. Hetta ávirkar øll í býnum, um vit vilja tað ella ei.

Onnur lond hava eisini fíggjarkreppu í løtuni, og hava gjørt ymsar bjargingarætlanir, og tað er tann vegin, vit eisini skulu. Í Danmark t. d. verða íløgur spjaddar runt alt landið, tí har hevur stjórnin sæð, at hetta er gongda leiðin, nú tað privata ikki er væl fyri.

Um onki verður gjørt, so skal man verða heilt vísur í, at alt samfelagið steðgar upp, samstundis, sum svartskygni ikki bjargar nøkrun.

Fokus er nú sett á eldraøkið í Føroyum. Hví ger landið so ikki einsamalt íløgur í ellis- og røktarheim, flestu kommunur megna tað ikki, sum er. Her sleppa fólk til arbeiðis beinanvegin, samstundis, sum vit um fá ár hava nøktað tørvin á røktarheimsplássum. Nú tað ikki er so nógvur aktivitetur í samfelagnum, blívur byggingin heldur ikki so dýr.

Løgmaður sigur, at vit eiga nógvan pening í ymsum grunnum. Hevur løgmaður ætlanir um at nýta hendan peningin ella part av honum til at gera íløgur við runt landið, ella hvussu…?

# Politiskt ósamdir ella persónligt svínarí?

ROLF GUTTESEN



**Í einum lesarabrævi seinasta leygardag upp á einar 15 linjur ella so fær Kai Vágfjall nevnt at kalla øll aktuell politisk mál, sum eru frammi í Føroyum hesi árini, og nakað væl aftrat**

**Har eru millum annað:**

- fyrsti bankapakkin hjá stjórnini
- annar bankapakkin hjá stjórnini
- støðan til ES?
- hvalaveiði í Suðurhøvum?
- grindadráp í Føroyum?
- føroysk umboðan í Fólkatingi?
- ósemja millum løgmann og fólkatingsmann?

Har aftrat hevur Vágdal serlig evnir; hann dugir at gita, hvat ið føroyski fólkatingsmaðurin Edmund Joensen fer at gera og meina í komandi málum, sum enn ikki hava verið fyri. Hann er eisini púra vísur í, at sami fólkatingsmaður tá, einaferð í framtíðini, helst fer at "*svína Høgna Hoydal út*". Jamen, uhadada, tá verður synd í Høgna.

**Kanska gongur Edmund Joensen á skeið?**

Vágdal heldur seg eisini vita, at tá fólkatingsmaðurin ikki situr í Fólkatinginum, so gongur hann á skeið. Ja, hann leggur Edmund Joensen undir at "*ganga á skeið hjá fívlunum báðum Rolf Guttesen og Virgari Dalsgaard*."

Men takk, takk. Harra Vágfjall, tað er mær ein stórur heiður at blíva mettur (saman við Virgar Dalsgaard) at vera ein tann størsti vandin móti Tjóðveldisflokkinum og fullveldis-ideologiini. Sjálvur meti eg meg skeivt placeraðan í so máta, men tað verður harvið

Eg kann fyri mín part siga, at eg enn ongantíð havi hitt Edmund Joensen á máli í Keypmannahavn, men nakrar ferðir møtt honum á gøtuni í Havn. Hann hevur altíð verið blíður og fyrikomandi. Men somuleiðis plagar Hoydal eisini at vera smílandi og fittur at møta. Seinast eg hitti Hoydal, tað var á gøtuni millum Leigubúðina og Portugálið, tá tosaði hann mest um lásasmíð og lyklar.

**Tað er lætt, tá Verðin er svørt/hvít**

Tað, sum hevur fingið Vágfjall til skrivimaskinuna, er at Edmund Joensen og Hoydal ikki eru samdir í øllum málum, sum koma til viðgerðar í Fólkatinginum.

At trúgvandi tjóðveldisfólk halda, at Hoydal er ein dámligur og fittur maður, tað vita vit. At teir eisini halda, at Edmund Joensen er ein ódámligur og svikafullur maður, tað vita vit eisini. Tað er einki nýtt í tí.

**Vágfjall uttan politiskt innihald**

Í grundini er hetta løgna lesarabræv hjá harra Vágfjall uttan politiskt innihald. Tað snýr seg meira um at brúka so nógv negativ orð sum gjørligt, hvørjaferð Edmund'sa navn verður nevnt: óður, í parti við dønum, háðaði, pínligt, bluff, fjas, renna ørindir, ímóti Føroyum, svína út, og fleiri. Men hetta er so mátin hjá (summum) tjóðveldismonnum.

# Tað gera tey í Zimbabwe og Russlandi

EDVARD Í SKORÐINI JOENSEN



journalistur

Í londum sum Zimbabwe og Russlandi hava politisku myndugleikarnir ein veikleika, sum vit í vesturheiminum vanliga halda lítið um. Tey hava eina øgiliga trongd til at vilja blanda seg upp í, hvat lokala pressan ger. Altso stjórnirnar í hesum londum.

Soleiðis gera vit ikki í mentaða heiminum er norðan- og vestanfyri. Ikki stjórnirnar í hvussu er.

Tó við einum undantaki kortini. Í Føroyum hevur løggevandi tingið, Guð hjálpi mær, funnið uppá, at tað skal "heita á" leiðsluna í landsins almenna kringvarpi um at leggja ávísa sending ávísa tíð á degnum. Slíkt er óhoyrt í siviliseraðum landi.

Tað er sjálvsagt, at biskupur og próstur, prestafelag, fyristøðufólk á ellisheimum og sambýlum, pensionistafelagskapir og hundraðtals privatpersónar heita á Kringvarp Føroya um ikki at flyta morgunlesturin. Tingfólk kundu so passandi lisið og hildið seg til Matteus 22.21.

Persónliga haldi eg, at hasir tíggju minuttirnir kundu gott verið latnir teimum, sum lurta eftir hasi sendingini. Tey eru nógv. Kenni persónliga fleiri, sum harmast um hasa avgerðina.

Men at landsins løggevandi forsamling skal blanda seg í slíkt umsitingarligt mál, hóast tað enn bara var við eini áheitan, er nokk so langt úti. Hvat verður tað næsta? Skal Løgtingið kanska velja ein programnevnd til Kringvarpið og eina sensurnevnd fyri pressuna sum heild? Tað gera tey í londum sum Zimbabwe og Russlandi. Onkra klára løtu megnaði Jeltsin tó at taka hetta av, men eftirmenn hansara hava innsett góða, gamla KGB eftirlitið við pressuni aftur. Og teir journalistar, sum eru so mikið tápuligir, at teir siga sína meining, verða bara skotnir. So er friður.

Ikki tí. Í Føroyum er hetta ikki ókent kortini, at tingmenn vilja blanda seg í slíkar avgerðir. Tí hevur til dømis Strandferðslan livað við í áravís. Varð ein ferðaætlan lýst, var næstan víst, at lokali tingmaðurin reisti stórmál á Løgtingi fyri at flyta rutuna ein hálvan tíma ella nakrar fjórðingar til næstu bygd, sum eisini skuldi hava sjóvegis samband við umheimin. Slíkar eru treytirnar, umsitingin virkar undir í Føroyum. Og vit grenja um, at hon er dýr. Vælsignaði tingfólk. Fáið handan Sandoyartunnilin gjørdan, so vit um ikki annað sleppa undan klandri um ferðaætlanina hjá Teistanum í framtíðini.

Men kanska var tað bara eitt kærkomið høvi hjá tingfólki at lætta samvitskuna mótivegis stóra skaranum av pensionistum?

So ivaleyst átti Kringvarpið at sent morgunlesturin aftur fyrrapart. Tingfólk hava í hvussu er brúk fyri nøkrum góðum og uppbyggjandi orðum, áðrenn tey fara til arbeiðis.

# Tørvandi røktarheimspláss

ALFRED OLSEN



Løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin

Av røttum hevur fokus verið sett á spurningin um tørvin á røktarheimsplássum, tí sambært Nærverkinum, hava heili 132 fólk bráfeingis tørv á búplássi, á røktarheimi ella eldrasambýli.

Av hesum eru 71 í Suðurstreymoy, 11 í Vágum og Norðurstreymoy, 5 í Eysturoy, 25 í Norðoyggjum, 17 Suðuroy og 3 í Sandoy.

T.v.s. at tørvurin er størstur í Suðurstreymoy, Norðoyggjum og Suðuroy, meðan tað stendur frægast til í Eysturoy.

Rós skulu kommunurnar í Eysturoynni fáa fyri teirra prioritering av at byggja búpláss til tey eldru, bæði tá talan er um røktarheim (Runavík og Streymnesi), umframt tey 6 eldrasambýlini. Umframt hetta hevur Sjóvar kommuna søkt í fleiri ár, um at fáa loyvi til at gera eitt eldrasambýli á Strondum og eg vóni, at Rósa Samuelsen nú kemur at geva strandingum loyvi til at fara undir byggingina.

**Hvør er tað sum byggir?**

Tað eru kommunurnar, sum eru byggiharrar, bæði av røktar- og ellisheimum og av eldrasambýlum, og ikki landið.

Parturin hjá landinum er at stuðla byggingini við 50%, tá ið talan er um røktarheim, tó hægst við 500.000,00 kr. fyri hvørt búfólki, og við 50.000,00 kr. fyri hvørt búfólki, tá ið tað snýr seg um eldrasambýli.

Tað eru sostatt kommunurnar, sum standa fyri byggingini við fíggjarligum stuðli frá landinum, men tá ið heimini eru tikin í brúk, rindar landið allan raksturin, burtursæð frá náttarvaktini á eldrasambýlum.

**Landið appelerar til bygging**

Sum ein eyka appel til kommunurnar um at fara undir at byggja, hevur samgongan samtykt at hækka stuðulsupphæddirnar til røktarheim upp í 800.000,00 kr. og til eldrasambýlir upp í 80.000,00 kr. fyri hvørt búfólkið.

**Hvat er at gera?**

Loysnin er, at Suðurstreymoy, Norðoyggjar og Suðuroy, ið eru økini, har ið tørvurin er størstur, fara í gongd at byggja búpláss til tey eldru, og at landið beinanvegin, sum eina bráfeingis loysn, økir um heimahjálpina, so at øll okkara eldru fáa eina virðiliga tilveru, og verða passað á nøktandi hátt heima.

Lesið Sosialin - so eru tit við